# Tann gylta løtan til búskaparliga vend og burðardygd

HØGNI HOYDAL



**Vit hava góðar møguleikar at læra av altjóða kreppuni og okkara egnu vanstýring og leggja um til burðardyggar loysnir í Føroyum**

Lætt er at lata seg draga niður í ta búskaparliga myrkrið, sum politiska leiðslan í Føroyum í løtuni manar fram hvønn dag.

Men megna vit at leggja um og taka nakrar slóðbrótandi avgerðir, ið byggja á hugsjónarvirðini: frælsi, javnrættindi, samhaldsfesti og burðardygd, so hava vit í veruleikanum góðar møguleikar at menna okkum sum ein grøn vakstrarlund í miðjum Norðuratlantshavi og leggja rásina til ein sjálvberandi búskap.

Tí í mun til onnur lond, ið hava tengt sín búskap á fiktiv spekulasjónsvirði, hava vit við bara eini umlegging í okkara tilfeingisumsiting, har vit lutfalsliga liggja í einum av heimsins ríkastu og mest áhugaverdu økjum, møguleikan at fáa ein sterka búskaparliga vend.

Heimurin skríggjar eftir burðardyggari vinnu – og altjóða trýst liggur á okkum um at liva upp til hesi krøv, um vit skulu vera kappingarfør. Samstundis eru allir partar í Føroyum eftirhondini greiðir um, at okkara botnfiskaveiða og floti má ígjøgnum broytingar, um talan skal vera um fíggjarliga og búskaparliga burðardygd fyri vinnuna sjálva. Bara politiska skipanin blokkerar harðliga fyri broytingum.

Ítøkiliga hava vit í Tjóðveldi okkara greiða boð uppá hesa umlegging við uppskotinum um fiskivinnureform og tilfeingisbúð.

Tað er byrjanin til eisini eina búskaparliga vend.

**Studningsbúskapur ella sjálvberandi búskapur**

Vit kunnu av røttum spyrja: Hvør er munurin á tí sannroynd, at lond og fyritøkur hava blást eina fíggjarbløðru upp, har tey lán og tann peningur, ið varð sprændur inn, ikki hevði veruliga framleiðslu og virðisskapan aftanfyri seg – og so tann blokkstuðulsbúskapin, sum mong tvíhalda um í Føroyum. Har vit skulu hava fígging til at seta virksemi í gongd, ið ikki hevur nakra veruliga virðisskapan aftanfyri seg í okkara egna samfelag, og sum ikki verður partur av einum reellum politiskum stríði um at býta samfelagsskaptu virðini og skapa burðardyggar sosialar loysnir?

Og vit kunnu av røttum spyrja, um ikki ein samanhangur er millum tann heimastýrisbúskapin, vit hava bygt upp við sonevndu ríkisveitingini, og so tann vinnupolitikk, ið hevur stýrt okkara høvuðsvinnu og tilfeingisumsiting?

Og kann ein broyting í hesi fastlæsingini – hesum politiska búskapi – skapa okkum nýggjar møguleikar.

**Nýggja búskaparkanningin hjá Norðuratlantsbólkinum**

Hendan spurningin hava vit fingið eitt sera gott og kvalifiserað svar uppá við teirri búskaparkanning, sum Jóannes Jacobsen, Ph.d í búskaparfrøði og Stefan í Skorini, samfelagsfrøðingur, hava gjørt fyri Norðuratlantsbólkin.á Fólkatingi, og sum varð givin út og løgd fram í hesum mánaðinum: "Á veg móti einum sjálvberandi búskapi". Kanningin lýsir serliga vinnupolitikkin, fiskivinnupolitikkin og ríkisveitingina í føroyskum búskapi og politikki.

Niðurstøðurnar eru rættiliga greiðar:

- Ein samanrenning millum politiskar bólkar, arbeiðsgevarar og verkafólk í fiskivinnuni hava hildið bygnaðinum í fiskivinnuni føstum við serskipanum og serligum stuðli, ið hevur forðað fyri nógv størri avkasti í fiskivinnuni, og hevur forðað fyri burðardyggari veiði, umframt at aðrar vinnur ikki hava kunnað kappast við serskipinirnar í fiskivinnuni.
- Tað er ein mýta, at fiskivinnan ber øllum og er tann einasta vinnan, ið skapar virðir í Føroyum. Hon ber nógvum og er største útflutningsvinna, men vit hava vitanarvinnur og tænastuvinnur og almennar tænastur, sum skapa virðir og vøkstur.
- Alivinnan er dømi um eina vinnu, ið er farin frá politiskari stýring og serskipanum, og ístaðin hevur kravt politiskar karmar og alment regluverk, ið gera hana kappingarføra og góðkenda á heimsmarknaðinum.
- Ríkisveitingin hevur havt – og hevur enn stóra ávirkan á føroyska búskapin. Hon hevur óbeinleiðis skapt grundarlag fyri, at serskipanir og studningar hava kunnað verið givnir til fiskivinnuna og at politiska skipanin heldur enn at leggja skattir á ella finna aðrar fíggingarmøguleikar, hevur kunnað nýtt ríkisveitingina sum fríholtur fyri at taka skilagóðar avgerðir.
- Ríkisveitingin gevur møguleika fyri øktari nýtslu á heimamarknaðinum uttan at gjaldast skal við útflutningi – og tískil elvir ríkisveitingin búskaparliga til minni ein minni útflutningsvinnu.
- Øll lond, sum eftir 1960 hava tikið loysing og frásagt sær ríkisveitingar, hava havt fall í samlaða búskapinum í styttri ella longri skiftistíð, men so við og við fáa tey størri búskaparvøkstur og vinna tað innaftur í mun til onnur lond.
- Tað ber ikki til at "bíða til vit fáa ein sjálvberandi búskap" og síðani siga ríkisveiting frá sær. Skal samfelag, vinna og útflutningur tillaga seg og sjálvberandi búskapur skapast, so noyðist avgerðin at takast um at verða ríkisveiting fyriuttan til tess at bygnaðirnir kunnu broytast í samfelagnum – í eini skiftistíð.

**Bráðvøkstur og bráðstøðgur**

Hetta mugu sigast at vera serstakliga áhugaverdar niðurstøður. Í fjølmiðlunum varð mest fokuserað uppá, at "tað kostar í 25 ár at loysa", tí hetta var miðaltalið fyri tillagingartíð, tá kanningin tekur øll lond úr triðja heiminum við, sum hava verið løgd í sor av kríggi, borgarakríggi og náttúruvanlukkum o.s.fr.

Kanningin sigur í veruleikanum ta øvuta: Eftir eina skiftistíð aftaná loysing, koma sjálvt tey londini, ið hava sera ringt útgangsstøði á sama støði sum onnur ella hægri búskaparliga.

Men vit mugu spyrja okkum sjálv: Hvussu nógvar niðurgongdir og tillagingartíðir hava vit gingið ígjøgnum við tí búskapi og búskaparpolitikki, sum vit hava havt undir heimastýrinum, har vit hava havt bráðvøkstur og bráðstøðg so ofta í búskapinum? Bara kreppan í 80'unum kostaði 13 milliardir út gjøgnum vindeygað – og nú standa vit aftur í eini støðu, har vit brendu alt av í einum óstýrdum bráðvøkstri og nú skulu fíggja hall omanfyri 800 mió. kr.

Vit mugu sum Tjóðveldi brúka kanningarnar til at siga erliga: Ja, vit skulu rokna við einum falli í búskapinum, tá vit gera okkum leys av av ríkisveitingini og taka nýggjar ábyrgdir og útreiðslur á okkum. Men vit kunnu við skilagóðum búskaparpolitikki, vinnupolitikki og sosialpolitikki í eini skiftistíð og frameftir, so hinvegin stýra undan teimum stóru sveiggjunum, har vit spola uppá á aldukambar og síðani dumsa niður í aldudalar búskaparliga. Vit kunnu skapa ein sjálvberandi búskap.

# Brúgvin um Sandá

JÓGVAN ARGE
býráðslimur í Havn



Sjálvsagt skal gott ferðasamband verða millum Havnina og Argir. Tað hevur frá fyrsta degi verið fortreyt fyri livilíkindum á Argjum og verður tað ikki minni í framtíðini.

Tí er eisini farið undir ringvegin á Argjum, nevndur Glyvursvegurin, sum er syðsti endi á ringvegnum, ið byrjar á Eystaru bryggju í Havn. Hesin ringvegur er vegurin úti við Strond, Eystari Ringvegur, Norðari Ringvegur og síðani Marknagilsvegur, ið gongur í Velbastaðvegin.

Ætlanin var altíð, at Marknagilsvegurin skuldi halda fram út á Argir og niðan á Argjahamar, sum er eitt øki í stórari menning við stovnum, skúlum og ikki um at tala bústøðum undir Kongavarða.

Samband millum Marknagilsvegin og Glyvursvegin krevur, at brúgv verður gjørd um Sandá og sjálvsagt eisini vegastubbarnir til hana, hvussu langir teir so verða. Málið hevur ofta verið uppi og vent, men tann fyrsta og higartil besta royndin køvdnaði í onkrum mistaki fyri fleiri árum síðani og helst eisini vantandi umstøðum.

Fyri fimm árum síðani varð so samtykt at gera ringvegapartin argjamegin, sum røkkur frá Reynsgøtu niðan á Argjahamar. Hann er liðugur og er at líkna við eina autostradu av teimum frægu. Kostnaðurin bleiv hareftir, men nú er hann so har.

Brúgvaloysnin er alneyðug. Tað hava argjamenn sannað í næstan 200 ár og hava bygt ikki færri enn tríggjar brýr um ánna. Spurningurin nú er bara, hvar tú leggur teg í arkitektoniskum og verkfrøðingaligum hugflogi og í kostnaði. Fyrra treytin til brúnna er, at hon í eitt drúgvt áramál kann svølgja ferðsluni, sum hon er ætlað til, og onnur, at hon er eitt umhvørvisliga skilagóð byggiverk

Sum málið hevur verið borið fram í miðlunum hesar seinastu dagarnar, so tykist ógreitt, hvat ætlanin er við kostnaði - viðhvørt er brúgvin dýr, viðhvørt er hon ódýr - og summar myndir sýna eina rættiliga framsókna loysn, sum óivað kostar ikki sørt.

Sum fyrrverandi limur í bygginevndini fyri brúnna um Sandá havi eg tí hug til at viðmerkja, at tann seinasta niðurstøðan, sum nevndin kom til í mínari tíð, var, at eitt uppskot frá donskum arkitektum, sum lá á borðinum, var ov kostnaðarmikið, tí tað flottaði sær í so nógv.

Settur varð spurningurin, um tað kundi fáast einar 20 mió krónur niður, og annars varð eisini samtykt at seta seg í samband við aðrar brúgvakønar at vita, um teir vóru menn fyri at koma við uppskoti um eina betri, dyggari og ódýrari loysn.

Sum eg havi skilt er hetta sambandið komið í lag, og har liggur málið í løtuni.

At brúgvin kemur, er lítil ivi um. Nokkso fitt av peningi er eisini settur av til hennara í langtíðaríløgum fyri 1911 og 1912. Hvat kostnaðurin verður, vita vit av góðum grundum ikki enn, men hugmyndin er so avgjørt at seta skjøtul á hana í hesum skeiðnum.

# Nú má valda friður og nærningurin í hásæti!

LEVI MØRK



Eg vil hervið upplýsa tykkum, at eg havi boðað Heðin Mortensen, borgarstjóra, frá, at eg ynski ikki at vera partur av skúlastýrinum hjá Tórshavnar kommunuskúla. Eg haldi, at hetta mál er farið út av sporinum, og her verður politikkur og skúlastýrisarbeiði blandað saman. Tað ynski eg ikki vera partur av í einum skúlastýri.

Uppgávan má vera at fremja tað besta fyri næmingarnar, og okkara uppgáva í skúlastýrinum er at fremja tað besta fyri næmingin og ikki at fara at klandrast við okkara egnu kommunu, tað er ikki partur av fólkaskúlalógini, sum umfatar skúlastýrisumboðan eftir §50 í fólkaskúlalógini.

Eisini kann nevnast, at eg ikki havi fingið fundarboð til skúlastýrisfundir hjá Tórshavnar Kommunuskúla og seinast kann nevnast, at eg ikki eri partur av at brúka advokatar og annað í stríðnum ímóti Tórshavnar kommunu, sum eisini er í ímóti býráðssamtyktini, sum eg eisini eri ein partur av.

At enda, nú má valda friður og næmingurin í hásæti!

(skjótt fyrrverandi skúlastýrislimur hjá Tórshavnar kommuskúla)